# Bókstavirnir eru myndevnið

**Seinnapartin í gjár lat Anita Nattestad Karlsen upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hetta er aðru ferð hetta seinasta árið at hon hevur framsýning á hesum staði**

LIST
*Snorri Brend*

**Havn:** Tað er ikki á hvørjum degi, at høvið er at síggja eina framsýning við kalligrafi'um.

Henda serstaka listastílin hevur hálvføroyska Anita Nattestad Karlsen lagt seg eftir.

Og hesa komandi vikuna fáa føroyingar høvið at síggja fleiri av verkum hennara á hesi framsýningini.

Myndir hennara eru bygdar upp um eina bakgrund, og eina yrking ella sangørindi, sum verður skrivað á við teirri serligu kalligrafi-skriftini.

- Í veruleikanum skapar mynstrið í bókstavunum í veruleikanum myndevnið, sigur Anita, sum verður 35 ár leygardagin.

Framsýningin í Smiðjuni er opin hvønn dag frá kl. 14 til 18.


*Kalligrafi-skriftin er væl umtókt, og tí nýtir Anita Nattestad Karlsen tær eisini sum myndevni hjá sær*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Frá presti

Myndirnar hjá Anitu og tekstur teirra er bæði á føroyskum og donskum.

Fyri at fáa tekstirnar at hóska til myndirnar er hon allatíðina opin fyri yrkingum ella sangum, sum kunnu gerast til ein málning.

Ein av teimum, sum eigur fleiri av yrkingunum á málningum hennara er David Johannesen, prestur í Miðvági, sum er í ætt við mammu hennara.

- Eg eigi allar bøkur hansara, og eg taki fegin yrkingar hjá honum við í myndir mínar, sigur Anita.

Umframt málningalistina, so hevur Anita eisini ábyrgd fyri einum av føstu teigunum í Alt for Damerne, nevniliga teigin við hugskotum til húsini.

## Til Mary og Frederik

Anita er útbúgvin í kalligrafi í Onglandi í 1999. Hon hevur eisini arbeitt har eitt skifti júst sum kalligrafur.

Í Danmark hevur hetta við kalligrafi'ini eisini vundið nógv uppá seg, og hevur Anita tí nógv at gera í tí dagliga við at skriva t.d. borðkort og menukort við hesi serligu skriftini.

Umframt hetta, so er hon eina ferð um mánaðin í Onglandi og arbeiðir við hesum sama. Nevnast kann eisini, at hon til brúdleypið hjá Fredriki og Mary handaði teimum ein málning, sum hon sjálv hevði gjørt júst við hesi listagreinini.

Hon var í Smiðjuni í Lítluvík í oktober mánaði í fjør. Verk hennara vóru so mikið væl umtókt, at hon hevur valt at koma aftur í ár.

# Tunlar stongdir á náttartíð

**Nógv arbeiði er í føroysku tunlunum í løtuni. Nú hendir eisini nakað í tunlunum á Kalsoynni**

VEGARBEIÐI
*Snorri Brend*

**Kalsoy:** Tað var frøi á fólki, so hvørt sum tunlarnir á Kalsoynni lótu upp fyri almennari ferðslu á sinni.

Hinvegin so kann staðfestast, at lítið er gjørt við at hampa um hesar tunlarnar innan síðani tá.

Men nú eru so menn hjá Landsverki farnir til verka í tunlinum til Mikladals.

- Og nú verður so arbeitt hesa vikuna, verður upplýst á heimasíðuna hjá Landsverki.

Í fyrsta lagi verður gjørt soleiðis, at vatnið sum seyrar niður úr loftinum, kann verða beint burtur.


*Tunlarnir á Kalsoynni hava brúk fyri eini umvælandi hond. Teir eru nú so smátt byrjaðir, og fólkið í oynni vónar at hildið verður fram, til alt arbeiðir er heilt liðugt*

Mynd: Jens Kr. Vang

Mong mundu helst ynskt sær – og vóna tað framvegis – at tunlarnir verða gjørdir fullkomuliga lidnir, m.a. við at leggja asfalt á. Nær tað verður, tað má so bara tíðina vísa.

Meðan arbeitt verður í tunlunum í Kalsoynni eru teir stongdir frá kl. 21 til kl. 6 á morgni fram til leygardagin 24. september.

Annars verður eisini arbeitt í Norðskálatunlinum og í Árnfjarðartunlinum í hesum døgum.


BYGGIBÚÐ

damor



Rockwool
95 mm 45,-
70 mm 36,-



498,-

Alpha-tools borehammer
- 850 watt
- 750 omdr. min
- v/slaghamara
- Tekur borir upp til 26mm
- Sera góða bremsu
- Ein rúgva av yniskum tilhoyri fylgur við.
- 5 ára garanti



Blandimaskina
- 125 l
- 700 watt
- Sera ljóðleys

1.998,-



498,-

Bosch Akku bori- / skrúvimaskina
- 12 volt
- 1,2 nh
- Sera kraftig og løtt maskina
- Liggur val í hondini
- Kølitaska fylgir við
- 5 ára garanti

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor